## Meksiko ikki slept málinum

Í síðstu viku sáddi veðurlagskommiserurin hjá ES, Connie Hedegaard, iva um, at tað fer at bera til at røkka einari bindandi avtalu á næstu veðurlagsráðstevnuni, sum verður í Meksiko seinni í ár. Men teir meksikonsku vertirnir hava avgjørt ikki slept ætlanini um at fáa eina bindandi avtalu. Juan Rafael Elvira Quesada, umhvørvisráðharri, segði á tíðindafundi í gjár, at meksikanska stjórnin fer fyrst at skipa fyri einum fundi millum umhvørvisráðharrarnar, men ríkis- og stjórnarleiðararnir fáa onga innbjóðing uttan so, at semja er um eina bindandi avtalu, segði hann.



## Brúka barnatrælir

Tey flestu munnu vera samd um, at sjokoláta smakkar væl, men tey fægstu munnu vita, at sjokolátuídnaðurin brúkar fátæk børn sum fyrsta liðið í framleiðsluni. Ekstrablaðið skrivar í dag, at í Fílabeinsstrondini verða børn brúkt í kakao-plantasjunum. Tey fáa onga løn og verða hótt við lívinum, um tey royna at flýggja. Tey seinastu árini hava myndugleikarnir funnið meiri enn 300 børn í plantasjunum, og tey yngstu vóru seks ára gomul. Samstundis vórðu 48 mannasmuglarar tiknir. Børnini eru ikki bara úr Fílabeinsstrondini, men eisini úr grannalondunum Burkina Faso, Mali og Niger, skrivar Ekstrablaðið.

# umhvørvissvín

skotinum í sínari heild.

Í viðmerkingunum frá Umhvørvisstovuni staðfestir hon, at »Tað er okkara fatan at uppskotið til veðurlagspolitikk, er alt ov lítið ambitiøst, og ov lítið ítøkiligt.«

Eisini vísir Jóhanna Olsen á, at vinnan á landi ikki er nevnd í uppskotinum, og at Umhvørvisstovan metir hetta verða ein stóran mangul.

- Politikkurin ber alt ov nógv brá av at eingi tiltøk verða sett vinnuni, staðfestir hon.

### Kostnaðurin fyri semjuna

Vit hava í morgun roynt at fingið orð á landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Anniku Olsen, og ætlaðu at spyrja hana, um tað er nøktandi, at Føroyar eru at finna millum tey minst ambitiøsu og framsøknu londini í heiminum, sum hava orðað ein veðurlagspolitikk. Hetta hevur tó ikki eydnast fyri evstamark.

Annika Olsen segði tó við Dimmalætting tann 15. oktober 2009, at hon persónliga gjarna hevði sæð, at vit lækkaðu útlátið við 35 prosentum, soleiðis sum upprunaliga uppskotið hjá Tjóðveldi mælti til, men at hon visti, at hetta er ikki realistiskt.

Hon sigur eisini, at breiða semjan um uppskotið var neyðug, tí hetta skal halda meira enn ta einu samgonguna.

Sostatt er kostnaðurin fyri at fáa allar flokkar á tingi at taka undir við veðurlagspolitikkinum tann, at Føroyar í altjóða høpi eru at finna millum tey mest dálkandi londini í heiminum, sum longst hava stríðst ímóti at taka undir við einum altjóða veðurlagspolitikki, sum hevur til endamáls at skerja útlátið av veðurlagsgassum munandi.



### FAKTA

Veðurlagspolitikkur Føroya staðfestir, at Føroyar skulu minka útlátið av veðurlagsgassum við 20 prosentum í mun til útlátið í 2005 áðrenn 2020.

Hetta svarar til eina minking í útlátinum á 10 prosent samanborið við útlátið í 1990, sum flestu heimsins lond hava sett sum grundarlag undir teirra veðurlagspolitikki.